tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Politikkur ella glantrileikur

## *Oddagrein*

Leiktjøldini eru drigin frá, og glantrileikur verður aftur sýndur á leikpalli Føroya. Tríggir høvuðsleikarar eru á pallinum á hesum sinni, men statistarnir eru fleiri í tali. Hóast eitt sindur bleikur og afturhaldandi hevur Signar á Brúnni ein týðandi leiklut, men verpur kortini ikki gullegg.

Sum landsstýrismaður í undirvísingarmálum kann hann ikki siga annað enn, at hann skilir støðuna hjá Lærarafelagnum. Tað segði hann við Sosialin ígjár. Hann er jú sjálvur lærari, og hann skar jú út í papp, tá hann sat í andstøðu, at nýggja fólkaskúlalógin fór at kosta pening. Orsøkin var m. a., at lærarar fingu meiri arbeiði, og tí mátti pultstímatalið lækkast. Ti heldur Signar á Brúnni eisini, at lærarar skulu fáa eina samsýning fyri økta arbeiðsbyrðu. Tað segði hann við Útvarpið í vikuskiftinum. Nú vantar bara, at hann er at fremja áskoðan sína í verki.

Men. Og nú kemur stóra MEN´ið. Landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum skilir eisini hin leikaran, Karsten Hansen, landsstýrismann í fíggjarmálum. Hesin er ein myndugleikans persónur og hevur sett seg tungt á kassan. Hóast kassin er rokaður, skal hvørki Signar á Brúnni fáa nakað til fólkaskúlalærarar, ella Óli Breckmann fáa nakað til skattalætta.

Soleiðis heldur leikurin fram. Signar á Brúnni roynir at tekkjast lærarunum í annað borð, men í hinum borði tekur hann eisini undir við Karsteni Hansen, sum verjir høll úti á Argjum. So er spurningurin, um leikurin kemur til ta niðurstøðu, at Signar á Brúnni kann ikki bæði blása og hava mjøl munninum, ella hann kemur til ta niðurstøðu, at landsstýrismaðurin heldur væl til standa, og at hann kann bæði kann blása og hava mjøl í munninum.

Men áskoðararnir - Føroya fólk - eru tilvitandi um, at talan er um ein glantrileik, og at skjótt verða leiktjøldini drigin fyri, meðan pallurin verður broyttur til næstu pallmynd. Men áskoðararnir mugu bara ásanna, at føroysku lærararnir fóru í verkfall á fyrsta sinni, meðan ein skúlamaður umsat skúlamál, og ein annar tjóðveldismaður umsat fíggjarmál. Og hetta í eini tíð, tá føroyska skútan sigldi fyri fullum segum á fullveldiskós.

Hin pallmyndin lýsir eisini ein part av poltiska lívinum í oyggjalandinum, har tað gongur sera striltið at seta ta óskrivaðu semjuna í verk. Semjuna, sum eingin søgumaður fer at finna. Hon segði skattalætta, men tað er óðamannaverk at lata skattalætta, sigur maðurin á kassanum, tí ferðin á búskapinum er longu ov stór. Karsten fær rós og herðaklapp. Men ikki frá samstarvsfelagnum, Óla Breckmann. Hann krevur, at »orðið« í semjuni verður hildið, og at skattalætti verður latin. Og hann fær rós og herðaklpapp frá teimum, sum halda, at fólkið skal hava meiri pening um hendi. Soleiðis styrkja leikararnir hvønn annan í verbalum álopum. Politikkur? Ella glantrileikur?

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Musikkskúlaskipan í gleivstøðu

Samrøða var í Sosialinum 24. februar við meg um langar bíðilistar og gongdina í musikkskúlaskipanini annars. Í blaðnum í gjár 14. mars hevur S. Simonsen viðmerkingar.

**Samrøðan**
Eg eri rætt endurgivin og geri ikki mun á lærarum, men sigi, at munur er á umstøðum teirra. Samrøðan hevur als einki við lærarar, leiðarar ella førleikar teirra at gera.

Tað er ikki altíð lætt at lesa millum reglurnar. Viðhvørt verður lisið í meira lagi og onkuntíð enntá við síðuna av.

Ætlanin er sjálvsagt, at tulkingar skulu bera á fremjandi bógvin, og tí verður nomið við knøttar, men handalagið skal helst verða so frægt, at teir ikki fara í baklás.

Neyðugt er at eggja myndugleikum til loysnir, tá ið sakin má metast at vera gagnlig. Leiðarapartin á staðnum meti eg at hava so stóran týdning, at hann, parturin, eigur at mennast.

Neyðugt er við foreldrum ella avvarðandi, sum halda næmingum til og sýna áhuga. Hetta hava nógv foreldur vitað leingi, men mín uppgáva er at siga tað fleiri ferðir.

**Skipanin**
Tað mest torgreidda málið í musikkskúlaskipanini, er tann landafrøðiliga og samsvarandi kommunalpolitiska spjaðingin. Hesum grundleggjandi fyritreytum arbeiðir musikkskúlaskipanin undir. Samfelagsbygnaðurin gevur mikið fyrisitingarligt høvuðbrýggj, har mest sjálvsagdi møguleikin tykist vera fjøltáttan, men ikki einsháttan.

Tað verður ikki uttan hóvasták at vit broyta oyggjalandið til meginland, men Landsstýrið er í holtur við tað, og tað tekur drúgva tíð. Arbeitt verður í løtuni við bori og asfalti. Nýggj hugførsla fer at taka longur tíð, og vit kunnu bert meta um samfelagsmynstur, tá høvuðssetningurin er rokkin, nevniliga, at fáa gott samband við Havnina.

Landsstýrið hevur sett økismenningarráð til at ummæla samfelagsligar gongdir. Musikkskúlaskipanin er partur av samfelagnum, og í Føroyum hava vit í løtuni fleiri samfeløg við ymiskligum fyritreytum, landafrøðiliga og valdsliga.

Eg eri sannførdur um, at skulu skúlar mennast, er fólkið á staðnum altýðandi parturin. Valdsbygnaður, vilji/trekleiki, skjótleiki / drál og raðfestingar av áhugamálum á ymisku plássunum avgera gongdina. Musikkskúlanna tilvera liggur í løtuni í kommunalpolitiskum hondum, tí kommunur gera sjálvar av, um tær hava musikkskúla ella ikki. Tær kommunur, sum hava musikkskúla, ynskja flestar ein vøkstur. Og tað er gleðiligt, men landsjáttanin røkkur ikki til. Støddin á eindunum verður avgerandi fyri skap og innihald skúlanna. At skúlin við bestu fyritreytum og flestum næmingum helst fær hægsta støði, er einki undarligt, men tað órógvar meg, um munurin gerst ov stórur.

Landsstýrið hevur, um landsmusikkskúlastjóran, fakligu og námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini



og rindar ferðing millum undirvísingarstøðini. Avvarðandi kommunur hava, um leiðaran á staðnum, ábyrgd av undirvísingarhølum og ljóðførum.

**Innihald**
Ein góður skúli er sjálvandi annað enn breidd faldað við hædd. Fyritreytir mugu vera fyri trivnaði, virki, innihaldi og menning til mentan. Ikki minst telja hugburður, karmur, meining og ætlan á staðnum. Viljin til vøkstur má koma innanífrá, og stuðul kann koma uttanífrá.

Nógvar viðkomandi viðmerkingar og tulkingar hava verið um mínar útsagnir, og tað fegnist eg um.

Vit vita, at innihaldsrík tónleikaundirvísing gagnar børnum menningarliga, við samveru, virkni, trivnaði og upplivingum. Kanningarúrslit vísa, at hon stuðlar onnur mennningarøki í uppalingini.

Ætlanin er at fremja breidd og hædd við innihaldi, og at arbeiða tilvita við báðum.

Musikkskúlin eigur at geva vanliga føroyska barninum/ungdóminum førleikar til egið gagn, eins og skúlin skal vera førur fyri at geva teimum undirvísing, ið ætlað sær yrkisleið innan tónleik.

Fjøltáttaður uppalingarligur vøkstur er málið, men hendan vakra orðing er léttasti partur av málinum.

**Maðurin**
Viðmerkingar um mín persón fyltu nakað ríkiliga í brævinum og bóru brá av høvuðstema.

Brævskrivarin staðfestir, at landsmusikkskúlastjórin er havnarmaður, og tað er ikki heilt við síðuna av. Og onkran týdning hevur tað fyri mín forstand, um enn eg havi gloppað liðið í eingjargarðinum.

Hinvegin gagnar tað ongum, at viðgera arbeiðsgongdir, raðfestingar, trivna, vøkstur ella afturgongd í ymiskum økjum í blaðkjaki. Ætlanin er framvegis at menna skúlarnar.

**Menning**
Sum eg kenni viðurskiftini kring landið, so ber til at menna skúlarnar, men talan verður neyvan um at allir fáa sama karm og innihald. Stødd og landafrøðilig viðurskifti fara at spæla týðandi leiklutir. Men hetta er ein polistiskur spurningur.

Í løtuni royna fleiri at skapa karmar, og summastaðni er skúlin ein vinningur fyri samfelagið.

Men tað skerst ikki burtur, at skipanin er í gleivstøðu - við 1070 íðkandi næmingum og 1300 bíðandi.

Eg havi framvegis vónir um fremjandi tulkingar.

**Martin Mouritsen**
**Landsmusikkskúlastjóri**

# Kvøldseta á Kambsdali

*Næmingar í studentaskúlanum í Eysturoy fara hóskvøldið at vísa sínar listarligu dygdir*



Hóskvøldið klokkan 20[30] verður kvøldseta í studentaskúlanum á Kambsdali. Tað eru næmingarnir í skúlanum, ið standa fyri kvøldsetuni, sum verður í skúlahøllini. Lærararnir hava hildið næmingunum til at hava kvøldsetuna, og at hava eitt sovorðið tiltak í høllini verður mett sum eitt gott høvi hjá næmingunum eisini uttanfyri skúlatíð at vísa sínar listarligu gávur.

Á skránni hesa ferð eru listaframsýning, tónleikur, upplestur og sjónleikur. Tað kostar einki at koma inn. Undir kvøldsetuni fer 2. x, sum fyrireikar seg til eina ferð uttanlands, at selja kaffi og køkur.

Listaframsýningin fevnir um oljumálningar, tekningar og foto myndir. Fleiri næmingar stilla út, og felags fyri teir flestu teirra er, at hetta er fyrsta ferðin, teir alment sýna fram.

Tónleikin fara m. a. næmingar, sum hava tónleik á hástigi, at standa fyri. Harafturat verður eisini okkurt at hoyra frá bólkum, sum ikki beinleiðis hoyra til á studentaskúlanum, men sum fyri ein part eru mannaðir við næmingum úr skúlanum.

Onkrir næmingar fara at bera yrkingar fram, sum teir sjálvir hava skrivað, og næmingar í 2. a fara at spæla sjónleikin við heitinum Shakespeare in love.

Úr Kambsdali verður sagt, at øll eru væl komin at vera við í kvøldsetuni, sum er tann fyrsta av sínum slagi á studentaskúlanum. Ætlanin er í hvussu so er at hava eina kvøldsetu í hvørjum skúlaári, og tað verður hildið, at tað er hóskandi at hava kvøldsetuna, tá veturin – í hvussu so er sambært álmanakkanum! – er um at missa takið, ljósið vinnur á myrkrinum, og vársins songur so smátt er við at vakna.





*Føroysku sjúkrabilarnir eru gamli og í vánaligum standi*

# Sjúkir sjúkrabilar

*Føroysku sjúkrabilarnir eru í so ringum standi, at summir klára ikki altíð at koyra sjálvir. Mánadagin vóru tveir bilar sleipaðir heim aftur samstundis*

Edvard Joensen

Føroysku sjúkrabilarnir eru í so ringum standi, at støðan ikki kann góðtakast longur, siga keldur, sum standa sjúkrahúsverkinum nær. Mánadagin kom ein sløkkiliðsbilur úr Eysturoynni við einum bili á lastini og einum hangandi afturút. Annar var sjúkrabilur, meðan hin var ein bilur, hjá Landssjúkrahúsinum, sum brúktur verður til aðrar tænastur.

Keldur okkara ynskja ikki alment at leggja navn til upplýsingarnar, men blaðmaðurin kennir samleika teirra og kann vátta, at tær eru álítandi.

Tíðindablaðið Sosialurin hevur fingið at vita, at bilarnir eru í so ringum standi, at teir, sum koyra við teimum, ikki eru vísir í, at teir uttan trupulleikar vinna upp aftur hús, tá teir eru úti í flutningsørindum. Og tað er jú beinleiðis vandamikið, tá hugsað verður um, at teir eru ætlaðir at bjarga mannalívum. Har tað eru minuttirnir, sum telja. Tá er tað jú beinleiðis lívshættisligt, at bilarnar steðga upp, meðan teir eru til arbeiðis. Ein kelda okkara veit at siga, at mánadagin vóru tríggir sjúkrabilar á verkstaði.

Sagt verður, at samstundis sum pengar verða brúktir til tilbúgvingarætlan fyri oljuvinnuna, sum annars er í fínasta lagi, gloyma vit púra at halda okkara egna sjúkraflutning viðlíka. Bilarnir, sum í dag eru til taks, eru gamlir og niðurslitnir. Ikki bara í Havn og í Eysturoynni, men eisini á Sandoynni og í Vágum.

Í Klaksvík eru støðan heldur ikki betri enn góð. Heri Ellingsgaard, fyristøðumaður á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sigur, at teirra bilar eru umleið 10 ára gamlir og treingja álvarsliga til at verða skiftir út.

Klaksvíkar Sjúkrahús fær eisini ein nýggjan bil í hesum árinum. Tað eru tey heilt einfalt noydd til, sigur fyristøðumaðurin, tí teir báðir gomlu bilarnir eru vorðnir ov dýrir at halda. Klaksvíkar Sjúkrahús keypti ein nýggjan bil fyri umleið 10 árum síðan, og seinni ein brúktan, sum var á leið javngamal við hin, tey høvdu.

Tað er ein prioriteringsspurningur, sigur Heri Ellingsgaard. Alt ov lítið verður sett av til at reka sjúkrahúsverkið fyri, og so má veljast. Ella serliga veljast frá. Og har hava bilarnir so bøtt í fleiri ár.

Í grannalondum okkara høvdu hesir sjúkrabilarnir langt síðan verið settir fyri aldur. Og í øllum førum verið avlagdir sum neyðsendaakfør. Bæði í Danmark og Svøríki hava teir tann politikk, at tá bilurin nærkast teimum trimum árunum, verður hann ikki brúktur til neyðsendarferðir meira.

Men eins og vanligt hevur verið við fiskiskipum, hava føroyingar keypt brúktar, svenskar sjúkrabilar bíliga, tá sviar hava sett teir.

Ein kelda, Sosialurin hevur tosað við, heldur, at tað var ikki meira enn natúrligt, at føroyska sjúkrahúsverkið átti eina konto, sum burtur av var til at keypa sjúkrabilar fyri. Ein bilur um árið hevði verið rímiliga passandi, sigur kelda okkara, sum hevur skil á slíkum. Tað kundi verið gjørt við eini hálvari millión árliga á fíggjarlógini. So mikið - ella lítið - fyri ta trygdina.

Heri Ellingsgaard, fyristøðumaður á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, er samdur við ónevndu kelduni í, at vit áttur at brúkt ta hálvu milliónina árliga til at skift bilarnar regluliga út.



*Sjúkrabilarnir eru í so ringum standi, at teir, sum koyra við teimum, ikki eru vísir í, at teir uttan trupulleikar vinna upp aftur hús, tá teir eru úti í flutningsørindum. Sjúkrabilurin á myndini verður ikki brúktur longur*

# Vitjað Silicon Valley

11 leiðarar úr føroyskum fyritøkum og stovnum vóru á vitjan herfyri í Silicon Valley, fyri at kunna seg um menningina innan internetið og KT vinnur sum heild, skrivar Vinnuhúsið

Drívmegin aftanfyri vøksturin i heimsbúskapinum komandi árini verður í stóran mun internetið. Hesin nýggi samskiftismiðil fer at broyta lívið hjá tí einstaka, vinnu og samfelag, og byltingarnar fara at hava við sær eitt ótal av møguleikum. Fremstur í menningini av internet og kunningartøkni er ídnaðurin í California — og menningin gongur við fúkandi ferð.

Henda staðfesting var ein av orsøkunum til, at 11 leiðarar úr føroyskum fyritøkum og stovnum vóru á vitjan herfyri í Silicon Valley, fyri at kunna seg um menningina innan internetið og KT vinnur sum heild. Harumframt vildi ferðalagið kunna seg um strategisk leiðsluviðurskifti, m.a. innan innovation (nýskapan) og networking (netbygnaðarsamstarv).

Frá ferðalagnum fréttist, at ferðin var sera væleydnað. Vitjað var á bæði størri fyritøkum, t.d. Oracle og Hewlett-Packard, og á smærri fyritøkum, sum antin hava virkað í nøkur ár ella eru undir stovnan. Eisini vitjaði ferðalagið Stanford University, fyri at fáa innlit í hvussu útbúgving og gransking samstarva við KT vinnuna um nýskapan og menning.

Ein týðandi liður í vinnumenningini í Silicon Valley er vágafúsur kapitalur, bæði frá privatum íleggjarum og frá framtaksfeløgum. Í hesum sambandi var partabrævamarknaður ein nattúrligur liður í at fáa til vega fígging til fyritøkur. Føroyska ferðalagi fekk eisini høvi til at verða við í einum rundborðskjaki við vinnulívsfólk í Silicon Valley um viðurskifti innan KT og KT vinnumøgleikar í Føroyum. Víst var m.a á, at stórur tørvur er á arbeiðsmegi í Silicon Valley økinum, og í fleiri førum samstarva fyritøkur i California við KT veitarar í Europa og Asiu yvir internetið. Sonevndu »dot-com« fyritøkurnar, sum fáast við keyp og sølu á internetinum, verða spáddar stórar vakstrarmøguleikar framtíðini. Hóast føroyskt vinnuliv í dag er við í menningini á hesum øki, so var ferðin ein kveikjan til, hvussu føroyingar í enn størri mun kunna gangnýta møguleikarnar innan KT og verða við í hesi altjóða menning.

Ferðin var samskipa av TK Stovuni.

AUSTRALSKT KVØLD



Fríggjadagin 17. og leygardagin 18. mars

TIL MATNA VERÐUR
* Gratineraður roykur lambsryggur reivaður í urtareiðri og melón
* Strudsabúffur við grillaðum hummarahala og squash, kraftmiklari soppasós og nøtubakaðum eplum
* Sjokolátakokosparfait við suðurlendskum fruktum

Kostnaður kr. 270,-

Borð bílegging á tel. 31 75 00

Hotel Föroyar
Tlf. 317500
Best Western

Sosialurin - 311820